KÍ-EB/S 0-1 (0-0):

# Enn einaferð

**EB/Streymur trívist bara heilt væl í Klaksvik, har teir enn einaferð fingu fulla úrtøku mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*


*EB/Streymur vísti enn einaferð, at teir trívast framúr væl í Klaksvík*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Skuldi KÍ vinna seg úr kreppulíknandi støðuni, so var EB/Streymur helst ikki rætta mótstøðuliðið. Seinnu árini hava nevnliga víst, at skal tosast um nakað ræðslumótstøðulið hjá KÍ, so er EB/Streymur frammarliga í hesum hugtakinum.

Ferð eftir ferð hava teir á felagsliðnum við einføldum midlum sett KÍ út av spælinum, og í nógvar mátar var talan um eina endurtøku í so máta mikukvøldið.

At hetta so eisini er nakað, sum áskoðararnir hava vant seg við, tóktist greitt mikukvøldið. Talan var í øllum førum um eina hampuliga stóra fjøld, sum í miðvikuni hevði lagt leiðina norður um Leirvíksfjørð, har tey kanska roknaðu við, at gongd av álvara fór at koma á stigainnsavnanina.

### Toppskjúttin á blettinum

Tað var nevnliga fyri tað nógva KÍ, sum hevði bóltin. Teir royndu at trýsta móti EB/Streyma málinum, og nakrar ferðir fyri steðgin eydnaðist eisini at koma til møguleikar. Nærri enn einum vandamiklum stútara frá Ova Nysted komu teir tó ikki, og hinvegin lúrdi EB/Streymur alla tíðina.

Teir heilt stóru møguleikarnar gjørdist talan tó ikki um. Serliga tí nógv av kontra-spælinum hjá gestunum byggir á langar høgar bóltar fram móti áleyparunum, og móti eini verju við eitt nú Niclas Niclasen á liðnum, er hetta kanska ikki akkurát rætta uppskriftin.

Stutt inn í seinna hálvleik hepnaðist tó. KÍ misti í álopsstøðu, og hóast teinurin til málið var langur, so eydnaðist tað at senda Sorin Anghel avstað. Og tá Karstin Joensen kom út ímóti, eydnaðist rumenska framerjanum at prika til higartil málleysa Sonna L. Petersen, sum úr spískum kundi senda í kassan.

### Áhugaverdar avleiðingar

Og so var talan um somu søgu hjá KÍ. Trúgvin uppá, at tað kundi bera til at vinna á EB/Streymi tóktist vera fullkomuliga horvin. Teir royndu at trýsta, og teir fluttu fólk fram á vøllin, men veruliga bit var ikki í álopsspælinum.

Og tá gestirnir samstundis vóru nøgdir við at halda fast um leiðsluna, so gjørdist talan ikki um tað mest áhugaverda fótbóltsspælið.

Fyri báðar partar var talan tó um áhugaverd úrslit. Hjá EB/Streymi var hetta fyrsti sigurin, síðani teir í fyrsta umfarinum bastu GÍ, og bara tað í sjálvum sær er nógv vert. Hartil fekk Sonni L. Petersen við málinum eisini gongd á málskjótingina, og so er spurningurin, um hetta var startskotið til enn eitt gott kappingarár hjá toppskjúttanum frá í fjør.

Hjá KÍ var hetta hinvegin ein staðfesting av, at eitt venjaraskifti í sjálvum sær ikki er nøkur loysn úr eini kreppu. Enn liggur nógv og hart arbeiði fyri framman, um klaksvíkingar vilja ota seg uppeftir á talvuni. Enn er ikki ov seint, men munurin uppeftir kann skjótt gerast heldur stórur, um gongdin ikki verður vend.

**Fakta um dystin**

KÍ-EB/Streymur 0-1 (0-0)
0-1: Sonni L. Petersen, 55
Dómari: Georg Rasmussen
KÍ: Karstin Joensen – Leon Bjartalíð, Niclas Niclasen, Jan Andreasen, Eyðun Klakstein (Kristoffur Jacobsen, 80.) – Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør, Høgni Madsen (Julian Samuelsen, 70.) – Arnold Joensen (Erling Fles, 62.), Ove Nysted, Heðin á Lakjuni
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Bárður Olsen, Andrzej Pacek, Fróði Clementsen, Ólavur Poulsen (Gert Hansen, 52.) – Teitur Joensen (Knút Vesturtún, 46.), Marni Djurhuus, Jákup Martin Joensen, Hans Pauli Samuelsen (Hallur Jacobsen, 80.) – Sonni L. Petersen, Sorin Anghel
GK: Knút Vesturtún, 78., Jákup Martin Joensen, 81., Sonni L. Petersen, 90.

# Forloysing



Sum áleypari er sjálvsálitið av avgerandi týdningi, og tá hann í fjør fekk handað gylta skógvin, staðfesti Sonni L. Petersen eisini, at kanska júst hetta hevði verið týdningarmesta orsøkin til málini.

Í ár hevur tó einki vilja borið til. Sjúka og skaðar hava darvað venjingunum í uppstartinum, og tí hevur spælitíðin verið avmarkað. Á máltalvuni hevur verið púrasta turt, men í áttanda umfarinum eydnaðist altso at fáa hol á.

– Sorin gjørdist púra leysur av verjuni. Hann rak ímóti málverjanum, og tá hesin kom ímóti, so fekk eg prikað bóltin í málið, greiðir Sonni sjálvir frá.

*Hvussu kendist tað at skora aftur?*

– Heilt fantastiskt. Og tað er ikki bara eg, sum havi bíðað eftir einum máli. Bæði spælararnir og trúgvu áskoðarar okkara hava alla tíðina vóna, at tað skuldi bera til hjá okkum. Vit hava jú spælt ov nógv javnt og vunnið ov lítið, men vónandi var hetta tað, sum skal til fyri at venda gongdini, segði fegni málskjúttin at enda.

**-jm**

# Fastlæstir

**Hjalgrím Elttør heldur, at tey í KÍ nú bara bíða eftir forloysandi málinum. Men hann ásannar eisini, at hetta má koma nakað skjott**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*


*– Vit skora ikki, og tá vit so fremja eitt mistak, so verða vit revsaðir, heldur Hjalgrím Elttør*

*Mynd: Bárður Lydersen*

– Tað er sama søgan hjá einum liði, sum hevur mótgongd. Vit royna at spæla, og vit koma fram til nakrar møguleikar. Men vit skora ikki, og tá vit so fremja eitt mistak, so verða vit revsaðir.

Soleiðis staðfestir Hjalgrím Elttør, tá vit fingu orðið á hann mikukvøldið.

Um spælið sjálvt helt Hjalgrím annars, at hetta hevði verið á eini leið.

– Eg haldi sjálvur, at vit eru ávegis úr aldudalinum. Vit stýra dystinum fyri tað nógva, og vit skapa eisini nakrar møguleikar, men tað vil bara ikki rigga í løtuni. Men við innsatsinum, sum var gjørdur til dystin, so er tað bara ein spurningur um tíð, áðrenn vit fáa gongd á.

Men tíð er kanska ikki tað, sum tit hava mest av í løtuni?

– Nei. Tað blíva altso ikki við at vera 27 dystir eftir at spæla. Á stigatalvuni sær tað so yvir høvur ikki serliga gott út hjá okkum. Vit eru um at fáa spælið at koyra, og vit skapa møguleikarnar, men okkum vantar enn mál og stig, og tað eru hesi, sum telja, er turrisliga stafðestingin at enda.